# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundinum 27.05.2019*

**Bygdaráðsfundur 27.05.2019 kl. 18.00 til kl. 18.30**

| | | |
|---|---|---|
| **Fundarstað:** | **Fundarhøli** | |
| **Hjástødd**: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Petur Jákup Petersen (burturstaddur) | |
| | Kaj Eli Hansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Selma Hansen. skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 39/2019 Ársroknskapur 2018 – Roðin**
J.nr.00.32.10-S08-4-17
**Málslýsing**
Ársroknskapurin fyri 2018 hjá Roðanum er komin til ummælis hjá Nes kommunu.

**Tilmæli**
Á fundi 21.05.2019 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við roknskapinum hjá Roðanum soleiðis, sum hann er uppsettur.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 40/2019 Ársroknskapur 2018 – Nes kommuna**
J.nr. 00.32.10-S08-3-17
**Málslýsing**
Viðgerð og góðkenning av grannskoðaða ársroknskapinum fyri 2018 hjá Nes kommunu soleiðis, sum hann er uppsettur av SPEKT.

**Tilmæli**
Á fundi 21.05.2019 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við roknskapinum hjá Nes kommunu soleiðis, sum hann er uppsettur.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

*Ársroknskapurin fyri 2018 sæst á heimasíðuni undir leinkjuni, kommunan í tølum.*

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundinum 27.05.2019*

**Mál nr. 41/2019 Roknskaparreglugerð fyri Nes kommunu**

J.nr. 00.32.02-P00-1-19

**Málslýsing**

Roknskaparleiðarin hevur gjørt uppskot til Roknskaparreglugerð fyri Nes kommunu, sum samb. kunngerð um roknskaparverk kommunanna, skal góðkennast av bygdaráðnum.

Reglugerðin lýsir dagligu mannagongdin i fyrisitingini og inniheldur m.a. hesar postar:

- Roknskaparframløga og góðkenning
- Inntøkur og útreiðslur
- Umsiting av gjaldingum – kassi
- Alment um bókhald
- Móttøka av posti
- Varðveitsla av roknskapartilfari
- Fyrisiting av vørugoymslu og øðrum ognum
- EDV-Skipanir

**Tilmæli**

Á fundi tann 21.05.19 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við uppskotinum til roknskaparreglugerð fyri Nes Kommunu soleiðis, sum hon er uppsett.

**Avgerð**

Tilmælið hjá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 42/2019. Umsókn um byggiloyvi**

J.nr 02.34.02-P20-15-16

**Málslýsing**

Tann 26. apríl 2019 kemur umsókn frá Norðsetur, har biði verður um byggiloyvi til sethús hjá Geir Grækarisson Johansen við Lýðarsvegin. Talan er um eini sethús í 2 hæddum, við lágari reising. Staðsetingin er niðanfyri vegin, matr.nr. 474t.

**Tilmæli**

Á fundi tann 14.05.19 mælir Tekniska nevnd til, at geva byggiloyvi sambært viðløgdu tekningum frá Norðsetur.

**Avgerð**

Tilmælið hjá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 43/2019 Umsókn um tímar til serligan tørv í Barnagarðinum – Lukkað mál**
J.nr. 16.06.20-G01-1-19